# Avtala millum Sørvágs- og Vága kommunu um skipan av Barnaverndartænastu.

## §1
## Samstarvsavtala

millum Sørvágs kommunu og Vága kommunu um skipan av felags barnaverndartænastu sambært § 4 stk. 1, 4, 5 og § 6 stk. 2 í Barnaverndarlógini.

Við barnaverndartænastuni er at skilja felags barnaverndarnevnd og felags barnaverndarumsiting, sambært § 6 stk. 2, í barnaverndarlógini.

## §2
## Samstarvsnevnd

Fyri samstarvsavtaluna velja kommunurnar eina nevnd av borgarstjórunum í kommununum og formanninum í Trivnaðarnevndini í Sørvágs kommunu og formanninum í Mentunar- og Trivnaðarnevndini í Vága kommunu.

Nevndin skipar seg sjálv við øðrum borgarstjóranum sum formanni, og hinum sum næstformanni. Í hvørjum valskeiðið gongur formaðurin uppá skift millum kommunurnar 2 ár um ferðina.

Leiðarin í barnaverndartænastuni er skrivari hjá samstarvinum.

Avgerðir verða í mest møguligan mun tiknar við semju. Fæst ikki meiriluti fyri eini avgerð, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.

Kommunurnar í samstarvinum hava felags ábyrgd av starvsetan og starvsábyrgd av starvsfólkunum.

## §3
## Skipan av økinum

Barnaverndarumsintingin verður skipað sum partur av umsitingini í Vága kommunu.

Leiðari og starvsfólk, sum í minsta lagi skal hava miðallanga útbúgving og reina revsiváttan, verða sett sambært § 5 stk. 1.

Barnaverndarumsitingin nýtir journal- og telefonskipan, sum er partur av skipanum hjá Vága kommunu.

Barnaverndarumsitingin vísir til formannin í samstarvsnevndini, sum er bindilið millum kommunurnar í samstarvinum.

Felags barnaverndarnevnd, umboðandi kommunurnar í samstarvinum,verður vald.

Sørvágs kommuna velur ein lim og ein varalim, meðan Vága kommuna velur tveir limir og tveir varalimir, sum verða vald smb. § 4 stk. 3 í barnaverndarlógini.

Barnaverndarnevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

Barnaverndarumsitingin ger tilmælir, sum verða løgd fyri barnaverndarnevndina.

Barnaverndarnevndin tekur avgerðir við heimild í § 9 stk. 1 og 2 í barnaverndarlógini.

Fæst ikki meiriluti fyri eini avgerð, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.

§4
**Heiti**

Heitið á felags barnaverndartænastuni verður "Barnaverndartænastan fyri Sørvágs- og Vága kommunu.

§5
**Fígging av økinum**

Barnaverndartænastan verður fíggjað lutfalsliga eftir fólkatalinum (pr. 31. desember í árinum frammanundan) í kommununum í samstarvinum sambært § 68 í barnaverndarlógini.

Í sambandi við árligu fíggjarætlanina, verða kommunurnar at avseta játtan sambært fíggjarligu uppgerðini, sum tekur støði í undanfarna roknskaparári.

Mánaðarligt acontogjald, samsvarandi fíggjarætlanini, verður goldið fyri raksturin av barnaverndartænastuni tann 01. í hvørjum mánaði fyri inniverandi mánað.

Nevndin ger fíggjarætlan, sum verður at leggja fyri kommunustýrið/býráðið til góðkenningar.

Fíggjarætlanin skal haldast. Um eykajáttan krevst, skal hon góðkennast av kommunustýrinum/býráðnum sambært kommunustýrislógini.

§6
**Kunning um virksemi og rakstrargongd**

Fyri hvønn ársfjórðing ger barnaverndarumsitingin fíggjarligu støðuna upp í mun til fíggjarætlanina og virksemi á økinum. Fráboðan verður latin kommununum í samstarvinum innan ein mánað eftir hvønn ársfjórðing.

Barnaverndartænastan kann ikki átaka sær eykaútreiðslur uttan neyðuga játtan, kommunustýrini kunnu, um neyðugt, veita eykajáttan.

§7

**Roknskapur og grannskoðan**

Roknskapur verður førdur og grannskoðaður saman við kommunala roknskapinum hjá Vága kommunu.

§8

**Limaskapur**

Kommunurnar lima seg inn í samstarvið við samtykt í kommunustýrinum/býráðnum. Ein møgulig uppsøgn krevur eisini eina samtykt í kommunustýrinum/býráðnum.

Samstarvsavtalan heldur áfram til onnur kommunan sigur hana upp. Avtalan kann sigast upp skrivliga við 6 mánaða freist til tann 1. januar, tó í fyrsta lagi til tann 1. januar 2017.

Um samstarvið verður niðurlagt, skulu ognirnar býtast eftir somu treytum, sum fíggingin av teimum var.

§9

**Gildiskoma**

Samstarvsavtalan kemur í gildi tann 1. januar 2015. Hon eigur at verða endurskoðað áðrenn 30. september 2018.

§10

**Eftirlit og góðkenning**

Sambært barnaverndarlógini skal Landsstýrismaðurin í Almannamálum góðkenna samstarvið.

Samtykt á bygdaráðsfundi í Sørvágs kommunu tann 10. desember 2014

**Sørvágs kommuna**

Sune Jacobsen, borgarstjóri

Sunrid Rasmussen, skrivari

Samtykt á býráðsfundi í Vága kommunu tann 15. desember 2014

**Vága kommuna**

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari

Tórshavn, tann 5/2·2015

**Almannamálaráðið**

Annika Olsen, landsstýriskvinna